# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Teir ungu argaðu teir eldru

**A-landsliðið vann 4-0 á U21-landsliðnum, men leingi argaðu ungu menninir teir vaksnu, áðrenn luftin at enda fór úr framtíðini**



*Róaldur Jacobsen og Atli Danielsen í nærdysti. Tá avtornaði vunnu Atli og teir 4-0, men leingi argaðu ungu menninir teir vaksnu í venjingardystinum mikukvøldið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ikki sørt av spenningi undan fyrstu uppgávuni hjá Brian Kerr sum landsliðsvenjara. Áðrenn tað av álvara verður álvara, hevði landsliðsvenjarin sett U21-liðnum stevnu. Og hóast talan mest av øllum var um innanhýsis venjingardyst, so var áskoðarafjøldin á leið tað, sum hon hevur verið til ein meðal landsdyst seinnu árini.

A-landsliðið vann sjálvan dystin 4-0, og tað í sjálvum sær er helst nøktandi. Men tað var vert at bíta merki í, at tað langt ífrá var alla tíðina, at teir eldru vóru so sannførandi, sum tølini siga.

## Teir ungu argaðu

Einki mál kom fyri steðgin, og sum so var tað eisini avmarkað, hvussu nógvir møguleikar vóru. Holst hevði ein stóran av slagnum tíðliga í dystinum, men frálíkt málmansspæl frá Trygva Askham forðaði tó fyri, at nakað meira spurdist burturúr.

Í øðrar mátar hevði A-landsliðið bóltin nógv, men teir komu sjáldan ígjøgnum, og tá tað onkra ferð riggaði at koma ígjøgnum síðurnar, var kvaliteturin á innleggunum snøgt sagt ov lítil.

Og spakuliga hóttu U21-menninir eisini málið hjá Jákupi Mikkelsen. Besta møguleikan átti Rasmus Nielsen, men hann sendi við síðurnar av, og í aðrar mátar vóru skotroyndirnar ov veikar til veruliga at hótta málið.

Eftir steðgin kom tó vend í. Fyrst og fremst tóktist tað muna sera væl, at kantarnir hjá A-liðnum nú vóru skiftir. Andreas Lava Olsen og Hjalgrím Elttør komu inn í alopið saman við Andrew av Fløtum, og teir tríggir stóðu fyri teimum fýra málunum, sum at enda skildu partarnar.

Tíðliga í seinna hálvleiki legði Andrew upp til Hjalgrím, sum skoraði. Lavamaðurin økti til 2-0 eftir horna, áðrenn hann átti uppleggið til 3-0 málið hjá Andrew. Og seint í dystinum, tá luftin tóktist vera farin úr ungu monnunum, koyrdu teir tríggir í felag eitt kontra-álop, sum endaði við, at Andrew púrasta leysur kundi økja til 4-0.

### Teir fyrstu 11 hjá Kerr

**Byrjunaruppstillingin hjá A-landsliðnum móit U21-liðnum var hendan:**
Jákup Mikkelsen – Johan Troest Davidsen, Atli Gregersen, Egil á Bø, Einar T. Hansen – Bogi Løkin, Fróði Benjaminsen, Súni Olsen – Johan Ejvind R. Mouritsen, Christian Lamhauge Holst, Christian Høgni Jacobsen.

## Hondbóltslandsliðið tikið út

**Landsliðsvenjararnir Dia Midjord og Kári Nielsen hava tikið út 17 útispælarar og 3 málmenn til teir seinastu 4 EM-undandystirnar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroyska A-landsliðið spælir heima ímóti Russlandi hóskvøldið 11. juni, heima ímóti Italia leygarkvøldið 13. juni, úti ímóti Serbia mikukvøldið 17. juni, og seinasti dysturin er heima leygarkvøldið 20. juni ímóti Bosnia-Herzegovina.

**Hesir spælarar eru í hópinum:**
**Neistin:** Tróndur Kragesteen, Karl Herup Olsen, Áki Mørk, Ingi Olsen, Birgir Poulsen og Ári Dam.
**H71:** Janus Sørensen, Regin Joensen, Dánjal Torgarð, Gunnar Blåberg, Esbern Patursson, Johan Hofgaard og Levi Nybo
**VÍF:** Sámal Joensen og Rúni Joensen
**Kyndil:** Hans Áki Dal-Christiansen, Bárður Johannesen, Torvald Abrahamsen
**KÍF:** Niklas Reginsson, Ási Dam

Hóskvøldið 4. juni, klokkan 19:45 spælir landsliðið venjingardyst í Hoyvíkshøllini ímóti VÍF. Altjóða dómaraparið Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen dømir dystin.

Á míðdegi mánadagin 8. juni verður endalig úttøka til fyrstu tveir dystirnar ímóti Russlandi og Italia. Tólv spælarar og tveir málmenn verða úttiknir.